UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Eysturkommuna
Oyran 2
512 Norðragøta

Tórshavn, tann 10. juni 2024
J. nr.: 23/14119-5
Viðgjørt: KHP
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøki B2 í Fløtugerði í Leirvík**
Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Eysturkommuna í telduposti dagfestum 28. juni 2023 sent Umhvørvismálaráðnum uppskot til til til serstaka byggisamtykt fyri sethúsaøki B2 í Fløtugerði í Leirvík, matr. nr. 339a til góðkenningar.

Serstaka byggisamtyktin liggur í einum B2 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir. Serstaka byggisamtyktin inniheldur m.a. treytir um staðseting, hæddarviðurskiftir, frástøðu til mark v.m.

Uppskotið hevur ligið frammi frá 14. novembur til 8. desembur 2022. Tá ið freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 30. desembur 2022, hevði kommunan fingið eitt brotingaruppskot, sum ikki er gingið á møti.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og í skrivi dagfestum 29.mai 2024 viðmælir býarskipanarnevndin serstøku byggisamtyktina fyri sethúsaøki B2 í Fløtugerði í Leirvík.

Sagt verður frá, at Umhvørvismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir, serstøku byggisamtyktina fyri sethúsaøki B2 í Fløtugerði í Leirvík.

Sambært § 7, stk. 1, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skal kommunan kunngera byggisamtyktina, beinanvegin hon er góðkend. Byggisamtyktin fær gildi, tá ið hon er kunngjørd.
Sambært § 3, stk. 1, í kunngerð nr. 122/2023 um lendisskrá skal kommunan senda Umhvørvisstovuni broyttu byggisamtyktina í seinasta lagi fýra vikur eftir, at hon er góðkend av Umhvørvismálaráðnum.

Mint verður á, at hóast Umhvørvismálaráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Eysturkommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, sleppur kommunan ikki undan at fáa til vegar møguligar aðrar góðkenningar, sum krevjast frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

**UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Environment

Hjálagt hesum góðkenningarskrivi er serstaka byggisamtyktin fyri sethúsaøki B2 í Fløtugerði í Leirvík við átekning frá Umhvørvismálaráðnum.

Vegna Umhvørvismálaráðið

Jóannes N. Dalsgaard
*fulltrúi*